# Tey 100 ára gomlu vinna mest

**Higartil hava HB og KÍ tryggjað sær sjey FM heiti, og tey hava næstu dagarnar møguleika at vinna uppaftur fleiri**

FM VINNARAR
*Jóannes Hansen*

Í vikuskiftinum vórðu fleiri av yngru deildunum avgreiddar, og har, sum tað ikki er liðugt spælt, verður lok lagt á næstu dagarnar.

HB og KÍ halda hundrað ára føðingardag í ár, og tað gera tey eftir øllum at døma við maner. Higartil hevur HB vunnið fýra FM heiti, og KÍ hevur vunnið trý FM heiti, og tey hava møguleika at vinna uppaftur fleiri.

HB er vorðið meistari í 1. deild hjá monnum, dreingjadeildini, smápiltadeildini og í gentur 10-12 ár. HB er í finaluni í unglingadeildini, har teir annað mikukvøld verða roknaðir sum favorittar ímóti EB/Streymi.

Tað verður spælt um FM í nógvum deildum, meðan tað í øðrum deildum verður spælt um fyrsta plássið og gull og uppflyting og í øðrum deilum verður spælt um fremsta plássið og gullkrónur. HB hevur møguleika at vinna tvey sett av gullkrónum afturat. Annað er í 3. deild, har teir sunnudagin skulu spæla avgerandi uppgerð á heimavølli ímóti GÍ, og hitt er í 4. deild, har teir leygardagin skulu spæla finalu. Mótstøðuliðið ta ferðina verður eisini GÍ.

KÍ hevur vunnið FM í kvinnudeildini, í piltadeildini og í pinkudeildini. Klaksvíkingar hava møguleika at vinna gull í smádreingjadeildini. Teir styrktu leygardagin um sína støðu, tá ið teir vunnu 4-0 á heimavølli ímóti TB. Tvøradreingir hava eitt gott lið. Teir eru við í FM kappingini, eitt nú tí teir fyrr í summar vunnu 7-0 á heimavølli ímóti KÍ. Hini liðini í FM kappingini í smádreingjadeildini eru B36 og NSÍ.

Kappingin verður liðug leygardagin. Í gjárkvøldið skuldu B36 og KÍ spæla í Klaksvík.

NSÍ er meistari í gentudeildini, AB vann leygardagin FM fyri smágentur (gentur 12-14 ár), og SÍF vann leyardagin FM fyri piltar á hálvum vølli. Somuleiðis vann leygardagin old boys kappingina.

Leygardagin stóð somuleiðis greitt, at KÍ aftur í ár vann kvinnukappingina, og hava vit meira um hetta í blaðnum í morgin.

Sosialurin ynskir øllum vinnarunum hjartaliga tillukku. Vit rokna við næstu dagarnar at fáa myndir av øllum FM vinnarunum.



*Í Sandavági var fagnaðurin stórur, tá piltarnir hjá SÍF – sum annars hava manning úr øllum bygdunum í oynni – kundu vissa sær FM-heitið*



*Tað er ikki bert hjá teimum vaksnu, at HB hevur nakað at fegnast um. Eitt nú hevur felagið vunnið smápiltadeildina*
*Mynd: www.hb.fo*

## 1. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 16 | 12 - 3 - 1 | 42 | 13 | 29 | 39 |
| 2 | B36 | 16 | 9 - 3 - 4 | 29 | 17 | 12 | 30 |
| 3 | Skála | 16 | 8 - 3 - 5 | 30 | 21 | 9 | 27 |
| 4 | KÍ | 16 | 5 - 8 - 3 | 22 | 20 | 2 | 23 |
| 5 | EB/Streymur | 16 | 6 - 4 - 6 | 26 | 22 | 4 | 22 |
| 6 | GÍ | 16 | 6 - 4 - 6 | 26 | 28 | -2 | 22 |
| 7 | NSÍ | 16 | 6 - 3 - 7 | 24 | 22 | 2 | 21 |
| 8 | VB | 16 | 5 - 4 - 7 | 21 | 22 | -1 | 19 |
| 9 | ÍF | 16 | 3 - 2 -11 | 21 | 46 | -25 | 11 |
| 10 | B68 | 16 | 2 - 2 -12 | 15 | 45 | -30 | 8 |

## 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 16 | 10 - 2 - 4 | 41 | 22 | 19 | 32 |
| 2 | B71 | 16 | 10 - 2 - 4 | 44 | 30 | 14 | 32 |
| 3 | AB | 16 | 9 - 2 - 5 | 27 | 22 | 5 | 29 |
| 4 | FSV | 16 | 8 - 3 - 5 | 54 | 32 | 22 | 27 |
| 5 | Royn | 16 | 8 - 1 - 7 | 36 | 35 | 1 | 25 |
| 6 | LÍF | 16 | 7 - 4 - 5 | 26 | 28 | -2 | 25 |
| 7 | Sumba | 16 | 6 - 4 - 6 | 23 | 27 | -4 | 22 |
| 8 | B36 | 16 | 4 - 3 - 9 | 22 | 43 | -21 | 15 |
| 9 | KÍ | 16 | 3 - 3 -10 | 26 | 35 | -9 | 12 |
| 10 | VB | 16 | 1 - 4 -11 | 16 | 41 | -25 | 7 |

## Máltindurin

adidas

| | | |
|---|---|---|
| Sonni L. Petersen | EB/S | 11 |
| Súni Olsen | GÍ | 11 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 11 |
| Heine Fernandez | HB | 8 |
| Jacob Bymar | KÍ | 8 |
| Bogi Gregersen | Skála | 8 |
| Jonhard Frederiksberg | Skála | 8 |
| John Petersen | B36 | 7 |
| Anderson | B68 | 6 |
| Sorin Anghel | EB/S | 6 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 6 |
| Høgni Zachariassen | ÍF | 6 |
| Erling Fles | KÍ | 6 |
| Egil á Bø | B36 | 5 |
| Heðin á Lakjuni | HB | 5 |
| Rúni Nolsøe | HB | 5 |
| Jákup á Borg | HB | 4 |
| Magni á Lakjuni | ÍF | 4 |
| Ian Højgaard | NSÍ | 4 |
| Nenad Stankovic | Skála | 4 |
| Milan Kulic | VB | 4 |
| Mindaugas | VB | 4 |

*Eftir at Rógvi Jacobsen fyri tað mesta hevur verið ovastur á máltindinum, eru bæði Sonni L. Petersen og Súni Olsen nú komnir ájavnt í málskjótingini*









## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 22. oktober 2004, kl. 10.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **bygning á leigaðum øki matr. nr. 70b í Porkeri.**

Ognin er ein virkisbygningur 1195 $m^2$ til støddar í einari hædd, gjørdur úr timbri og betong, taktur partvíst við aluminium og takpappi.

Sølan er umbiðin av **Christiani Andreasen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j.nr. 20040408),** sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 16. september 2004*

Human Resource Management Ráðstevna 21. og 22. oktober á Hotel Føroyum

# Lær teg at stýra og stimbra

Lykilin til framburð hjá eini fyritøku liggur hjá starvsfólkunum. Nútíðin krevur, at leiðslan hevur amboð, sum gera hana føra fyri at stýra og stimbra síni starvsfólk, teirra førleika og vitan. Málið er, at øll í fyritøkuni virka til frama fyri felags málum. Tað er millum annað hetta, sum Human Resource Management snýr seg um.

Seminarið vendir sær serliga til stjórar, leiðarar og starvsfólk, ið dagliga fáast við starvsfólkaleiðslu. Endamálið er at geva luttakarunum innlit í nøkur av týdningarmestu evnunum innan fyri hetta økið, og serligur dentur verður lagdur á sambandið við handilsstrategi hjá fyritøkuni.

Við at luttaka fært tú svarað einari røð av spurningum: Hvussu verður HRM-politikkur samskipaður við handilsstrategi? Hvussu tryggjar eitt virki sær tey røttu fólkini? Hvussu skapar fyritøkan eina góða menningar- og útbúgvingarætlan fyri starvsfólk? Er tað altíð fyritøkan, ið skal gjalda? Hvussu rationaliserar tú skilabest.

Dagarnir eru skipaðir við kjakuppleggum, kjaki, fyrilestrum, arbeiði við dømum og umbýti av vitan millum luttakararnar. Seminarið er skipað sum ein vistarskúli og tekur tveir dagar. Kostnaðurin er 5.950 krónur við øllum – t.v.s. undirvísing, tilfari, mati og gisting.

Fyri undirvísingini standa:
**Henrik B. Sørensen,** cand. merc og ph.d. í organisatión á Århus Universiteti, lektor á deildini fyri virkisleiðslu.
**Steinbjørn Hardlei**, Ba.Oecon í virkisbúskapi á Århus Universiteti, við altjóða serútbúgving í broytingarleiðslu á Professional Development Institute í Belgia.

Freistin at boða frá luttøku er mikudagin 6. oktober. Tilmelding fer fram hjá Steinbjørn Hardlei, stjóra í spf. Hugin, á telefon 225 331, teldupost shardlei@hugin.fo ella á heimasíðuni hugin.fo

hugin

Spf. Hugin, ráðgevingarfyritøka, Heiðatún 3, FO-160 Argir, www.hugin.fo

www.sansir.fo

## Hús á Toftum til sølu



Húsini eru í tveimum hæddum, miðhæddin er 70 fermetrar og loftið 41 fermetrar. Grundøkið er 604 fermetrar.
Byggiár 1987. Húsini eru í góðum standi, standa í barnavinarligum og friðarligum umhvørvi og við góðun útsýni.
Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 423523 ella 723523**







Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!